Sámal liðugur fyri í ár

Miðvallarspælarin Sámal Joensen, sum hevur verið millum bestu spælararnar í kappingini í ár, spældir ikki í seinastu tveimum dystunum hjá GÍ. Sámal fekk ein skaða í knæið undir venjing, og hann má binda frið í fleiri vikur. Tí kann hann ikki spæla við, tá ið GÍ týskvøldið spælir ímóti KÍ í Klaksvík ella í seinasta dystinum leygardagin, sum verður á heimavølli ímóti B36.

UEFA stúrir fyri landsliðum

Belgiska felagði Charleroi koyrir í løtuni eitt sakarmál ímóti FIFA. Orsøkin er, at ein spælari hjá teimum varð skaddur í landsdysti fyri Marokko, og Charleroi heldur seg hava krav til endurgjald fyri tíðina, ið spælarin ikki fekk spælt fyri felagið orsaka av hesum. Ein UEFA-talsmaður stúrir fyri framtíðini hjá landsliðunum, um Charleroi fær viðhald í sínum máli.

- Tað verða bert tey stóru londini, sum fara at hava ráð til at hava landslið, sigur William Gillard við BBC.

Sensatiónin lúrdi

Kvinnuliðið hjá StÍF mundi enn einaferð snýtt meistararnar úr Stjørnuni. VB megnaði eisini at basa Kyndli í Havn, og sostatt vunnu báðir favorittarnir í teirra fyrsta dysti.

HONDBÓLTUR

Teitur Joensen
teitur@sosialurin.fo

Síðsta vikuskiftið fór Sunset kappingin í gongd, men tá var bara tann eini dysturin á skránni. Hetta vikuskiftið vóru tveir dystir á skránni, og millum annað meistaraliðið úr Stjørnuni spældi á Skála, meðan VB vitjaði í Høllini á Hálsi hjá Kyndli.

StÍF var líka við at snýta meistararnar úr Stjørnuni. Tær fórdu seint í seinna hálvleiki við triumum málum, men á sjálvari málstrikuni kiksaðu tær. At enda vann Stjørnan við trimum málum, og tað var sum heild uppiborið.

StÍF mundi snýtt Stjørnuna

Tann fyrri dysturin, sum var á skránni hjá kvinnunum, var leygardagin í høllini á Skála. Her tóku strandakvinnur ímóti meistarunum úr Stjørnuni.

Stjørnan hevur mangan havt tað trupult á Skála, og henda søgu endurtók seg leygardagin. Í fyrra hálvleiki leikaði javnt á. StÍF fekk eina betri byrjan, men Stjørnan svaraði skjótt aftur. Eftir hetta skiftust liðini um at vera á odda. Tá farið var til hálvleiks, var støðan 10-11 til Stjørnuna.

Í øðrum hálvleiki var gongdin nakað øðrvísi enn í fyrra. Eftir eitt javnt korter, tók StÍF yvir. Frá støðuni 14-14 øktu tær uppá 5 minuttir uppí 18-15, og so lúrdi sensatiónin veruliga á Skála.

Tá hetta hendi, valdi Henrik Gerster at taka time out, og tað er ein spurningur, um ikki júst henda avgerð vendi dystinum. Eftir hetta stóð Stjørnan á øllum, og ikki minst Alina Olaru tók ábyrgd. Av síðstu seks málunum skeyt hon tey fýra, meðan StÍF hevði ilt við at raka málið hesa løtuna.

At enda var sigurin hjá Stjørnuni ikki í vanda, tí tá tær vóru komnar á odda við tveimum málum var týðiligt, at StÍF ikki hevði orku at svara aftur. Endaliga úrslitið á Skála gjørdist 22-19 til Stjørnuna, men sum heild má sigast, at stjørnukvinnurnar skulu vera glaðar at sleppa yvir um klaksvíksfjørð við báðum stigunum. Hinvegin kunnu strandakvinnur ergra seg, tí tær vóru líka við at skapa eina stóra sensatión. At enda kiksaði, men tær stríddust sera væl allan dystin.

VB basti Kyndli

Seinni dysturin hetta vikuskiftið var í høllini á Hálsi, har Kyndil tók ímóti VB. Undan dystinum var ilt at meta um, hvussu hesin dystur fór at enda. Kyndil hevur fingið onkran royndan leikara afturat hópinum, og tí var onkur, sum væntaði ein góðan og spennandi dyst í Havn.

Í fyrra hálvleiki var eisini líkt til, at dysturin fór at gerast spennandi. Verjurnar og málverjarnir stóðu sera væl, og tí komu ikki nógv mál henda hálvleikin. Tá liðini fóru til hálvleiks var støðan 7-6 til VB.

Í seinna hálvleiki kom meir gongd á álopsspælið hjá báðum liðunum, men tey fylgdust tó fyrstu løtuna. Tá knappir 10 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki var støðan 11-11. Men so fór VB í gongd, og ikki minst Daiva Tuomaite og Gurið Mortensen tóku fullkomiliga yvir eina løtu. Frá 11-11 økti VB um leiðsluna upp í 15-11, og eftir hetta hevði Kyndil ringt við at koma aftur í dystin.

Sum dysturin leið sást, at tær ikki kláraðu at hála VB leiðsluna inn aftur. Leiðslan helt sær allan dystin, og tá teir 30 minuttirnir vóru farnir an seinna hálvleiki, vóru enn fýra mál á muni millum liðini. Úrslitið gjørdist 24-20 til VB, og sostatt hava tær fingið eina góða byrjan uppá kappingina.

Daiva Tuomaite spældi ein sera góðan dyst fyri VB, og hon fekk ikki færri enn 12 mál. Hon sær sostatt út til at halda somu kós, sum síðsta kappingarár. Hjá Kyndli kom ósigurin sjálvsagt ikki so væl við, men liðið hjá teimum sær tó spennandi út, og tær kunnu saktans leypa hvøkk á fleiri av hinum liðunum í ár.

Málskjúttar StÍF:
Rebekka Justinusen 7, Ninna K. Johansen 5, Poula D. Olsen 2, Ata Gregersen 2, Bára B. Danielsen 2, Jóhanna í Króki 1
Útvísingar StÍF: 3

Málskjúttar Stjørnan:
Alina Olaru 8, Durita Christophersen 6, Anna Kristina Samson 2, Una Olsen 2, Joan M. Djordjevic 2, Simona Petersen 1, Maria við Neyst 1
Útvísingar Stjørnan: 0

Málskjúttar Kyndil:
Lina Andriulyte 6, Jacklin Durhuus 5, Jórunn Ludvig 4, Ronja M. Mikkelsen 2, Barbara Egilstrød 1, Anja Heinadóttir 1, Brynhild Klein 1
Útvísingar Kyndil: 2

Málskúttar VB:
Daiva Tuomaite 12, Gurið Mortensen 4, Jóna Thorsteinsson 3, Una Egilsdóttir 2, Theresa Joensen 2, Margreth Augustinussen 1
Útvísingar VB: 2

- Fingu Stjørnuna at ótolnast

Venjarin hjá StÍF, Justines Justinussen, var sum heild væl nøgdur við sítt lið. Hann helt, at StÍF stóð væl í verjuni, og at Stjørnan hevði stórar trupulleikar við at lata verjuna upp.

– Vit verja ótrúliga væl. Stjørnan hevur stórar trupulleikar við at sleppa ígjøgnum okkara verju, og hetta eri eg sera fegin um. Vit spældu klókt í álopinum, og fingu teirra verju at ótolnast. Tíverri høvdu vit trupulleikar at steðga Alinu, og hon megnaði eisini at vinna dystin fyri Stjørnuna at enda, staðfestir Justines.

– Spæla altíð illa á Skála

Una Olsen hjá Stjørnuni var nøgd við stigini á Skála leygardagin. Hon var tó ikki nøgd við spælið, og heldur, at Stjørnan hevur tað ikki ov gott inni á Skála.

– Vit hava tað ikki gott inni á Skála. Vit spæla altíð illa her, og tað mugu vit gera nakað við framyvir. Tað tykist, sum um vit ikki eru motiveraðar, og tað dugi eg ikki heilt at skilja. StÍF spælir tó klókt og dregur leikferðina niður. Hetta fær okkum at ótolnast, og tá gera vit feilir. Tíbetur vinna vit dystin at enda, men spælið má betrast til næsta dystin, sigur Una Olsen.